almannastovan
www.almannastovan.fo

# KUNNING frá Almannastovuni

***Lógarbroytingar við gildi frá 1. januar 2008.***

**FYRITÍÐARPENSJONISTAR[1]**
**- Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjón**

Við gildi frá 1. januar 2008 fáa lægstu fyritíðarpensjonistar hægri veiting. Samtykt er at leggja eina eyka viðbót aftrat pensjónini[2]. Hækkingin í lægstu fyritíðarpensjón er 15.360 kr. fyri árið 2008, t.v.s. 1.280 kr. um mánaðin. Í 2009 verður eyka viðbótin hækkað til 31.944 kr. fyri árið. Eyka viðbótin verður javnað eftir inntøku omanfyri frádráttarfría inntøkumarkið, – sí niðanfyri.

**- Frádráttarprosentið lækkað til 30%**

Fyritíðarpensjónin verður lækkað av inntøku, tá ársinntøkan umfram pensjónina fer uppum sonevndu frádráttarfríu inntøkuupphæddina. Lækkingin verður, við lógarbroytingini við gildi frá 1. januar 2008, broytt úr 60% niður í 30%. Broytingin fevnir um allar fyritíðarpensjónir, bæði hægstu, miðal og lægstu fyritíðarpensjón.

Í 2007 er frádráttarfría inntøkumarkið 81.300 kr. Í 2008 verður markið 84.600 kr.

Sum dømi kann takast, at hjá einum pensjonisti, sum í 2007 er skrásettur við eini arbeiðsinntøku á 91.300 kr., altso 10.000 kr. omanfyri markið, verður pensjónin lækkað við 60% av 10.000 kr. T.v.s. at 6.000 kr. verða drignar frá fullari árligari pensjónsupphædd, áðrenn pensjónin verður útgoldin.

Lógarbroytingin hevur við sær, at lækkingin í pensjónini í 2008 verður 3.000 kr., um inntøkan er 10.000 kr. omanfyri frádráttarfríu inntøkuupphæddina.

**FÓLKA- OG FYRITÍÐARPENSJONISTAR, O.O.**
**- Viðbót til ávísar pensjonistar ("brennistudningur").**

Við broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum[3], verður viðbót til ávísar pensjonistar hækkað við 1.140 kr. Saman við árligu javningini á 4% verður viðbótin tilsamans hækkað við 1.368 kr úr 5.556 kr. í 2007 til 6.924 kr. fyri árið 2008. Viðbótin, sum verður býtt og útgoldin í 3 pørtum (á 2.308 kr. í 2008), verður eisini veitt til persónar, sum fáa varandi veiting eftir forsorgarlógini.

**Endurbúgving – veiting til giftar persónar**

Løgtingið hevur samtykt at broyta treytirnar hjá giftum persónum fyri at fáa fíggjarliga veiting í sambandi við endurbúgving[4]. Lógarbroytingin hevur við sær, at giftir persónar nú altíð koma at fáa fíggjarliga veiting, tá staðfest er, at grundarlag er fyri at stuðla til endurbúgving.

Endurbúgvingarveitingin til giftar persónar hevur higartil verið treytað av inntøkuni hjá hjúnafelaganum. Avleiðingin fyri nakrar giftar umsøkjarar hevur verið, at teir als ikki hava fingið fíggjarliga veiting, hóast Almannastovan hevur staðfest, at endurbúgvingargrundarlag er. Aðrir giftir persónar hava í sambandi við endurbúgving fingið lægri veiting enn teir frá 1. januar fáa rætt til.

Tað verður aftaná 1. januar bara møgulig inntøka hjá tí, sum er í endurbúgving, herundir ÚS-stuðul, ið verður mótroknað í ásettu veitingini. Viðmerkjast skal, at ÚS-stuðul kemur framum veiting frá Almannastovuni. Tí skal ein persónur undir endurbúgving altíð søkja henda, tá útbúgvingin gevur rætt til stuðul frá Stuðulsstovninum.

**Giftir persónar, sum í løtuni fáa fíggjarliga veiting**

Almannastovan fer, við gildi frá 1. januar 2008, at broyta útrokningina av veitingini hjá giftum persónum, sum fáa endurbúgvingarveiting, soleiðis at hon ikki verður tengd at inntøku hjúnafelagans.

**Giftir persónar, sum ikki fáa veiting og eru í góðkendari útbúgving**

Almannastovan fer skjótast gjørligt at áseta veiting til giftar persónar, sum ikki fáa útgjald orsakað av hjúnafelagainntøku, í teim førum har

- Almannastovan hevur staðfest, at grundarlag er fyri endurbúgving og
- Útbúgvingin, viðkomandi er farin undir, er góðkend av Almannastovuni.

Fyri at kunna útrokna veitingina, má Almannastovan hava skjalprógv fyri fastar útreiðslur o.a. Tí mugu gift, sum eru í hesi støðu, sjálvi lata hesi skjalprógv inn, áðrenn útgjald kann avgreiðast.

**Giftir persónar, sum eru í ikki-góðkendari útbúgving, ikki eru byrjaðir ella eru givnir í útbúgving**

Ein giftur persónur, ið hevur fingið staðfest av Almannastovuni, at grundarlag er fyri stuðli til endurbúgving, men sum

- er farin í aðra útbúgving enn hana, Almannastovan hevur góðkent ella
- ikki er farin í útbúgving ella er givin, tí ongin veiting kom til útgjaldingar orsakað av inntøku hjá hjúnafelaga

kann eftir áheitan fáa mál sítt viðgjørt av nýggjum við atliti til møguliga góðkenning av útbúgving ella at byrja ella taka uppaftur útbúgving.

Ein og hvør, sum er giftur og hevur mál á Almannastovuni, har tað er staðfest, at endurbúgvingargrundarlag er, men onki útgjald fær, er vælkomin at ringja, skriva, senda teldupost ella venda sær beinleiðis til Almannastovuna fyri at fáa fleiri upplýsingar:

Arbeiðsmarknaðardeildina
Tinghúsvegur 14,
100 Tórshavn,
tel 35 35 70,
faks 35 35 71
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

## VEITINGARUPPHÆDDIR 2008[5]:

**Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**

| | Byrjunarár | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón – støk | 2008 | 50.028,00 | 4.169 |
| Grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør | 2008 | 39.756,00 | 3.313 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 2008 | 65.832,00 | 5.486 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – gift hvør | 2008 | 52.320,00 | 4.360 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 2008 | 35.712,00 | 2.976 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør | 2008 | 27.648,00 | 2.304 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 2008 | 65.436,00 | 5.453 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 2008 | 59.088,00 | 4.924 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 2008 | 21.240,00 | 1.770 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør | 2008 | 18.456,00 | 1.538 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 2008 | 20.052,00 | 1.671 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 2008 | 16.116,00 | 1.343 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 2008 | 15.360,00 | 1.280 |
| Hjálparviðbót | 2008 | 32.844,00 | 2.737 |
| Røktarviðbót | 2008 | 65.556,00 | 5.463 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 2008 | 30.720,00 | 2.560 |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd - fólkapensjónistar | 2008 | 56.400,00 | |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd - fyritíðarpensjónistar | 2008 | 84.600,00 | |

**Løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.**

| | Byrjunarár | Kr.árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|---|
| Upphædd til persónligan tørv til persónar 60 ár og eldri | 2008 | 11.088,00 | 924 |
| Upphædd til persónligan tørv til persónar undir 60 ár | 2008 | 13.296,00 | 1.108 |

| | | |
|---|---|---|
| Gjald fyri umlætting | 2008 | 121,47 kr. (um samdøgrið) |

**Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.**

| | Byrjunarár | Kr. árliga | Kr. pr. útgjald* |
|---|---|---|---|
| Upphædd | 2008 | 6.924,00 | 2.308 |

* 3 útgjøld um árið

**Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.**

| | Byrjunarár | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|---|
| Barnagjald smb. § 5 | 2008 | 11.832,00 | 986 |
| Barnagjald smb. § 15, stk. 1 og 2 | 2008 | 11.832,00 | 986 |
| Økt barnagjald smb. § 15, stk. 3 | 2008 | 23.664,00 | 1.972 |

| | | |
|---|---|---|
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1- | 2008 | 1.169,15 kr. um mán |

| | | |
|---|---|---|
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 2008 | 683,27 kr. (stakupphædd) |

**Løgtingslóg um eldrarøkt í Sandoynni og lógarkunngerð um lóg fyri Føroyar um almenna forsorg – gjald fyri uppihald á sambýli**

| | | |
|---|---|---|
| Gjald fyri umlætting | 2008 | 121,47 kr. (um samdøgrið) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli støk | 2008 | 3.353,00 kr. (um mán.) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli hjún | 2008 | 2.271,00 kr. (um mán.) |

[1] Sbr. Løgtingslóg nr. 112 frá 11.12.2007 um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir.
[2] Sbr. løgtingslóg nr. 114 frá 11.12.2007 um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum
[3] Sbr. Løgtingslóg nr. 113 frá 11.12.2007 um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum
[4] Sbr. løgtingslóg nr. 99 frá 1. november 2007 um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg (broytingar í § 18).
[5] Sbr. Løgtingslóg nr.113 og nr. 114 frá 11.12..2007 um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum og kunngerð nr. 121 frá 12. des. 2007 um áseting og javning av almannaveitingum.

KREA